

TEKNING: JÓN TÓRUR EINARSSON

***Uppruni menniskjunnar.*** *Sambært Jesper Hoffmeyer kann eingin við sínum fullu fimm seta spurnartekin við læru Darwins um, at menniskjan stavar frá einfaldari lívverum, sum hava ment seg ígjøgnum milliónir av árum. Men sambært professaranum er tíðin komin til at leggja onnur ástøði afturat.*

um, at lívið á jørðini hevur ment seg frá einføldum til samansettar lívverur ígjøgnum milliónir av árum. Men hann heldur ikki, at natúrligt úrval forklárar alt, sum vit síggja í náttúruni. Og í menniskjalívinum er so nógv, sum natúrligt úrval als ikki forklárar nøktandi.

– Tí hevur darwinisman ikki eitt fullfiggjað boð uppá, hví lív hevur ment seg soleiðis, sum tað hevur. Men tað vilja flestu lívfrøðingar als ikki kennast við, og tað skapar gróðrarlíkindi fyri anti-vísindaligari religión, sigur Jesper Hoffmeyer.

Í nýggju bókini kritiserar professarin eirindaleyst kristna kreationismu, sum grovt sagt er læran um ein Gud, sum skapti alheimin, soleiðis sum vit kenna hann. Tí er tað so týdningarmikið fyri mannin at menna eina teori, sum ikki avnoktar, at náttúran rúmar eina immateriella dimensjón, sum ikki letur seg kanna við náttúruvísindaligum amboðum.

– Trupulleikin við tí neo-darwinistisku heimsmyndini er, at hon reduserar veruleikan til nakrar mekaniskar og deterministiskar prosessir. Tað vil siga nakrar prosessir, sum eru avgjørdar og programmeraðar frammanundan, heldur Jesper Hoffmeyer.

> Hugskotið um *intelligent design* sigur í grundini, at av tí at vit menniskju ikki kunnu forklára alt her og nú, so má ein Gud vera til

## Ein nýggj menningarlæra

Grundleggjandi pástandurin hjá Hoffmeyer er, at darwinisman ikki kann forklára, hví ein planta altíð veksur ímóti ljósinum. Hví ein bakteria altíð leitar til tey støð, har føðsla er at finna. Hví livandi lívverur í heila tikið stremba eftir at yvirliva og nørast. Hví lívið á okkara lítlu gongustjørnu hevur ment seg soleiðis, sum tað hevur.

Hesar spurningar hevur hann funderað yvir alt hansara akademiska lív. Og eftir knøpp hálvtrýss ár á støvutum bókasøvnum og bonaðum laboratorium er hann komin til ta niðurstøðu, at Darwin bert forklárar ein part av menning lívsins á jørðini.

– Darwinisman forklárar, at summar lívverur hava størri sannlíkindi at yvirliva enn aðrar, og at tær best tillagaðu lívverurnar fáa meiri avkom enn tær ótillagaðu. Men Darwin segði einki um, hví livandi lívverur í grundini royna at yvirliva. Hví stremba allar livandi organismur eftir at yvirliva og nørast?, spyr Hoffmeyer og hyggur so inntreingjandi uppá meg, at eg næstan kenni meg noyddan at koma við einum svari. Men tað sleppi eg tíbetur undan, tí hann heldur sjálvur fram.

– Vit eru noydd til at tilskriva náttúruni ein ávísan sjálvstøðugan vilja ella tilvitsku. Annars gevur tað púrt onga meining, sigur Jesper Hoffmeyer.

Sjálvur hevur hann grundlagt eitt nýtt ástøði, sum ber heitið »semiotisk biologi«. Nýggja tesan bíðar framvegis eftir sínum altjóða gjøgnumbroti, hóast nøkur hundrað vísindafólk í vesturheiminum eru limir í altjóða felagsskapinum fyri biosemiotiska gransking. Ástøðið hjá Hoffmeyer og kompaní er ómøguligt at lýsa í eini blaðgrein sum hesari, men grundleggjandi snýr tað seg um, at allar livandi lívverur – frá teimum mest einføldu til tær mest kompleksu – eru tulkandi verur, sum interagera kreativt við sínar umstøður fyri at yvirliva og nørast. Náttúran rúmar við øðrum orðum eina tulkandi dimensjón, sum darwinisman als ikki fyriheldur seg til. Sæð í hesum ljósinum eru tað ikki bara genini inni í kyknum okkara, sum

▶